# TILMÆLI

# UM BROYTINGAR Í

# YRKISÚTBÚGVINGARLÓGINI

**LØGTINGSLÓG NR. 94 FRÁ 29. DESEMBER 1998,**

**SUM BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 65 FRÁ 10. MAI 2000.**

Tilmæli frá nevndini frá mars 2001
sett av Yrkisútbúgvingarráðnum
til at endurskoða nevndu lóg

Latið ráðnum í januar 2002

Á ráðsfundinum 21. mars 2001 samtykti ráðið at seta nevnd at endurskoða yrkisútbúgvingarlógina. Samtykt varð, at nevndin skal verða sett saman við sama lutfalli av limum frá feløgunum, ið hava umboðan í ráðnum sum er. Harumframt varð samtykt, at Mentamálastýrið skal hava 1 lim í nevndini og Yrkisútbúgvingarráðið 1 lim, sum skal verða løgfrøðingur og formaður í nevndini. Skrivarin í Yrkisútbúgvingarráðnum er skrivari í nevndini.

Í skrivi dagfest 26. mars 2001 varð heitt á feløgini og Mentamálastýrið um et velja limirnar. Tilnevndu limirnir vóru:
*Alfred Petersen*, adv., nevndarform., Yrkisútbúgvingarráðið
*Bjørgfríð Ludvig *)*, Føroya Handverksmeistarafelag
*Poul Øregaard*, Føroya Handverkarafelag
*Kristoffur Laksá*, Føroya Arbeiðsgevarafelag
*Jan Mortensen*, Føroya Arbeiðsgevarafelag
*Margreta Rasmussen*, Føroya Arbeiðarafelag
*Súsanna Joensen*, Starvsmannafelagið
*Pætur Niclasen,* S&K-felagið
*Hans Andr. Dam Joensen*, Mentamálastýrið
*Petur Oluf Hansen,* Yrkisdepilin, skrivari í nevndini
Fíggjarmálastýrið boðaði frá, at tað ongan lim hevði tøkan

*) Fyri Bjørgfríð Ludvig, sum seinni fór í farloyvi, kom Jákup í Gerðinum.

Í skrivi frá 7 september 2001 varð kallað til fundar tann 26. september 2001. Samstundis varð soljóðandi arbeiðssetningurin settur nevndini:

*"Uppgáva nevndarinnar er:*

*1) At endurskoða yrkisútbúgvingarlógina við tí fyri eygað, at lógin í mest møguligan mun lýkur tey neyðugu dagførdu krøvini til yrkisførleika og tey almennu krøvini til útbúgvingar.*

*2) At lógin í mest møguligan mun inniheldur tær neyðugu ásetingarnar og heimildirnar við atliti at øllum arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingum.*

*3) At tryggja, at samsvar er millum yrkisútbúgvingarlógina og aðrar útbúgvingarlógir á økinum, serliga við atliti at lógum á yrkisútbúgvingarøkinum, herundir støðisútbúgvingarnar (FHS, SIT og SIF) og tær framhaldandi útbúgvingarnar (HH, HT, HIF og møguligar aðrar).*

*Mælt verður til:*

*a) At yrkisútbúgvingarlógin er ein felags lóg, sum fatar um allar yrkisútbúgvingar, t.v.s. tær yrkisútbúgvingar, sum eru í dag (handverk/tøkni, handil og skrivstovu, og í næstum yrkisútbúgving innan havbúnað og yrkisútbúgving innan landbúnað), og at skipanin sum heild eisini tekur hædd fyri møguligum útbúgvingum, sum framyvir kunnu hugsast at koma at verða skipaðar sum yrkisútbúgvingar.*

*b) At støðisútbúgvingarnar (FHS, SIT og SIF) - sum sambært galdandi lógir bæði eru sjálvstøðugar útbúgvingar, umframt at verða støðið undir framhaldandi útbúgvingum – eisini og í mest møguligan mun verða partur av einari heildarútbúgving við atliti at yrkisútbúgvingunum.*

*c) At arbeiðsmarknaðarútbúgvingar eisini verða tiknar við í nevndararbeiðið, t.v.s. at heitt verður á nevndina um at gera uppskot um neyðugar ásetingar í lógini um reglur hesum viðvíkjandi, herundir ásetingar um fíggingarviðurskifti o.a., um so er, at nevndin metir hetta verða møguligt/neyðugt.*

*Heitt verður á nevndina um at lata Yrkisútbúgvingarráðnum sítt tilmæli í seinasta lagi tann 1. des. 2001."*

Nevndin hevur havt 7 fundir, har øll viðurskifti, sum nevnd eru í arbeiðssetninginum hava verið umrødd.

Upplýsast skal, at broytingarnar í høvuðsheitum snúgva seg um praktisk/fyrisitingarlig viðurskifti. Talan er sostatt ikki um serligar broytingar í verandi útbúgvingarskipan.

Viðvíkjandi tilmæli ráðsins (c) um eisini at taka spurningin um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar við í nevndararbeiðið, mælir nevndin til, at yrkisútbúgvingarlógin ikki eigur at fevna um slíkar útbúgvingar, men at tað ístaðin verður sett nýggj nevnd til at gera uppskot um eina sjálvstøðuga lóg um arbeiðsmarknaðarútbúgvingar.

Mælt verður til at broyta lógina soleiðis, at útreiðslurnar hjá yrkisnevndunum verður fíggjað av umsitingargjaldinum, og ikki sum nú, av feløgunum. Mælt verður somuleiðis til, at yrkisnevndir kunnu seta fyribilsnevndir, og at hesar fáa samsýning á sama hátt sum yrkisnevndir, t.v.s., at samsýningarnar verða fíggjaðar av umsitingargjaldinum. Henda broyting vil gera, at tey fíggjarligu viðurskiftini við atliti at ráðnum og serliga yrkisnevndunum verður greiðari og til fyrimunar fyri yrkisnevndararbeiðið.

Við tað, at stórur partur av útreiðslunum við atliti at ráðsskipanini sambært upskotinum verða fíggjaðar av umsitingargjaldinum, eiga fyrilit at verða tikin fyri, at hesar inntøkur minka, um lærlingatilgongdin minkar. Spurningurin er so, hvussu arbeiðið framhaldandi verður fíggjað?

Nevndin metir seg sum heild at hava greitt arbeiðssetningin og mælir til, at tær broytingar, sum nevndin mælir til, verða samtyktar.

Tórshavn 14. januar 2002

Alfred Petersen, formaður

Kristoffur Laksá — Poul Øregaard

Jákup í Gerðinum — Margreta Ramussen

Jan Mortensen — Súsanna Joensen

Hans Andr. Dam Joensen — Pætur Niclasen

| **Løgtingslóg nr. 94 frá 29.12.1998 um yrkisútbúgvingar sum broytt við Løgtingslóg nr. 65 frá 10.05.00 um broyting í løgtingslóg um yrkisútbúgvingar** | **Uppskot um broytingar:** |
|---|---|
| **Kapittul 1**<br>**Endamál o.a.** | |
| **§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri yrkisútbúgvingum umframt arbeiðsmarknaðar-útbúgvingum. | |
| **§ 2.** Útbúgvingarnar skulu miða ímóti:<br>l) at menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan<br>2) at leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving<br>3) at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið um ræður fakligan førleika og almennan kunnleika | |
| **§ 3.** Yrkisútbúgvingarnar verða skipaðar soleiðis, at skift verður ímillum verkliga læru á læruplássi og undirvísing í skúla, og at tær enda við útbúgvingarskjali. | |
| **§ 4.** Landsstýrismaðurin ásetur reglur um útbúgvingarnar sum heild og fyri hvørja útbúgving sær.<br>*Stk. 2.* Sambært §§ 19-20 verður sett eitt yrkisútbúgv-ingarráð, ið skal gera tilmæli um tær í stk. 1 nevndu reglur sambært heimildum í § 21.<br>*Stk. 3.* Sambært § 22 verða settar yrkisnevndir, ið skulu gera reglur fyri hvørja útbúgving sær sambært heimildunum í § 23. | **§ 4, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Landsstýrismaðurin ásetur reglur um útbúgvingarnar sum heild og yvirskipaðu reglurnar fyri hvørja útbúgving sær.<br><br>**§ 4, stk. 3 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Sambært § 22 verða settar yrkisnevndir, ið skulu gera reglur fyri hvørja útbúgving sær sambært heimildunum í §§ 23 og 24. |
| **§ 5.** Landsstýrismaðurin setur á stovn, leggur niður og tekur av yrkisútbúgvingar eftir tilmæli frá yrkis-útbúgvingarráðnum.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um upptøku í skúla, floksbýtistal og skúla samstarv eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum.<br>*Stk. 3.* Skúlagongdin fer fram í góðkendum skúla.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt í viðkomandi yrkisnevnd, smb. § 22, nærri reglur um skúlagongd og sveinaroynd fyri teir lærlingar, ið ikki kunnu fáa skúla-gongdina í Føroyum. | |

| | |
|---|---|
| **Kapittul 2**<br>**Atgongd til útbúgvingarnar**<br><br>**§ 6.** Tann, sum verður tikin í læru í einari yrkisútbúgving, skal hava fylgt undirvísingini til fráfaringarroynd fólkaskúlans og hava góðkendan lærusáttmála.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, um ein útbúgving verður roknað sum yrkisútbúgving og kemur undir sáttmálaskyldu.<br><br>**§ 7.** Skúlin hevur í teimum yrkisútbúgvingum, hann bjóðar seg fram í, skyldu at taka allar lærlingar, sum lúka treytirnar sambært § 6, stk. 1, inn í skúla.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, at partur av verkligu læruni fer fram í skúla, og at partur av skúlaundirvísingini fer fram á læruplássi. | |
| **Kapittul 3**<br>**Útbúgvingarskipanin** | |
| **§ 8.** Fyri lærlingar, sum byrja eina yrkisútbúgving við lærusáttmála, verður lærutíðin roknað frá tí degi, sáttmálin hevur gildi.<br>*Stk. 2.* Hevur lærlingur, áðrenn læran byrjar, tikið støðisútbúgving á yrkisskúla, kann skúlagongdin góðskrivast og lærutíðin styttast.<br>*Stk. 3.* Viðkomandi yrkisnevnd samtykkir, um tann í stk. 2 nevnda støðisútbúgving kann góðskrivast.<br>*Stk. 4.* Viðkomandi yrkisnevnd samtykkir útbúgvingarreglur, herundir reglur um útbúgvingartíð, býtið millum verkliga læru og skúlagongd, sbr. § 3, val av lærugreinum sbr. § 14, stk. 1 eins og reglur um endamálið við verkligu læruni og skúlagongdini sbr. §§ 11 og 16, samanber § 23.<br>*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, tær í stk. 4. nevndu útbúgvingarreglur fyri hvørja útbúgving sær. | **§ 8, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:** Fyri lærlingar, sum byrja eina yrkisútbúgving við lærusáttmála, verður lærutíðin roknað frá tí degi, sáttmálin hevur gildi, tó í fyrsta lagi frá tí degi lærusáttmálin er góðkendur av góðkenningarmyndugleikanum.<br><br>**§ 8, stk. 2 og 3 strikast og stk. 4 og 5 verða broytt til stk. 2 og 3**<br><br>**§ 8, stk. 5 verður broytt og fær hesa orðing:** . Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, tær í stk. 2 nevndu útbúgvingarreglur fyri hvørja útbúgving sær. |
| **§ 9.** Landsstýrismaðurin kann, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt í viðkomandi yrkisnevnd, áseta reglur um, at lærlingur við aðrari útbúgving ella arbeiðsroyndum, kann sleppa undan parti av verkligu læruni ella skúlagongdini.<br>*Stk. 2.* Útbúgvingarskipanin skal bera í sær, at um lærlingur má gevast við útbúgving síni, so skal tað verða gjørligt at taka hana uppaftur seinri, smb. § 35.<br>*Stk. 3.* Eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum kann verða skipað fyri ískoytisskeiði til lærling, sum skiftir útbúgving, smb. § 27, stk. 2.<br>*Stk. 4.* Lærlingi kann verða veitt eykaundirvísing í tann mun, hetta er neyðugt, fyri at útbúgvingin kann verða | **§ 9, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:** Landsstýrismaðurin kann, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum áseta reglur um, at lærlingur við aðrari alment góðkendari útbúgving kann sleppa undan parti av skúlagongdini.<br><br>**§ 9 fær nýtt stk. 2 við hesi orðing:** Viðkomandi yrkisnevnd samtykkir, um onnur faklig útbúgving og skeið ella arbeiðsroyndir kann sleppa undan parti av verkligu læruni ella skúlagongdini.<br><br>**§ 9, stk. 2, 3 og 4 verða broytt til stk. 3, 4 og 5.** |

| | |
|---|---|
| lokin, smb. § 15, stk. 2.<br><br>**§ 10.** Landskassin veitir stuðul til tær beinleiðis undirvísingarútreiðslurnar frároknað inntøkur við skúlaundirvísingini eftir hesi lóg.<br>*Stk. 2.* Eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum kann landsstýrismaðurin áseta reglur um gjald fyri útreiðslur til undirvísingartilfar.<br>*Stk. 3.* Læruplássini rinda tilfarsnýtsluna í sambandi við yrkis- og sveinaroyndir.<br>*Stk. 4.* Í hesi lóg skal yrkisfelag skiljast sum meginfelag, um viðkomandi felag er limur í einum meginfelag.<br>*Stk. 5.* Skúlagongdin er ókeypis fyri lærlingar. | **§ 10 fær nýtt stk. 2 við hesi orðing:**<br>Læruplássini rinda útreiðslurnar til undirvísingartilfar og tilfarsnýtsluna í sambandi við yrkis- og sveinaroyndir. |
| **Kapittul 4**<br>**Innihaldið í yrkisútbúgvingunum**<br><br>**§ 11.** Innihaldið í yrkisútbúgvingunum verður skipað samsvarandi endamálinum, sbr. § 2, og á tann hátt, at verkliga læran og skúlagongdin verða ein heild.<br>*Stk. 2.* Skúlaundirvísingin skal í byrjanini geva eina breiða heildarfatan. Seinni skal undirvísingin miða ímóti at veita lærlinginum neyðugan førleika í ávísum yrki. Undirvísingin skal verða so skipað, at hon nøktar skiftandi førleikakrøv frá vinnuni. | |
| **§ 12.** Undirvísingin fatar um yrkislærugreinir, grundlærugreinir og vallærugreinir.<br>*Stk. 2.* Yrkislærugreinir skulu vanliga hava tríggjar sættapartar av samlaðu tíðini, grundlærugreinir tveir sættapartar og vallærugreinir ein sættapart.<br>*Stk. 3.* Grundlærugreinir kunnu í serligum føri verða havdar ístaðin fyri yrkislærugreinir.<br>*Stk. 4.* Yrkislærugreinir kunnu í serligum føri verða havdar ístaðin fyri vallærugreinir. | **§ 12, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Undirvísingin fatar um yrkislærugreinir og almennar lærugreinir.<br><br>**§ 12, stk. 2 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Yrkislærugreinir skulu vanliga hava seks tíggjundapartar av samlaðu tíðini, almennar lærugreinir tríggjar tíggjundapartar og vallærugreinir ein tíggjundapart. |
| **§ 13.** Yrkislærugreinirnar fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið sermerkja viðkomandi útbúgving og skulu veita almennan kunnleika og fakligan yrkisførleika. Partur av yrkislærugreinunum eru serlærugreinir, ið eru á hægsta fakliga støði í útbúgvingini og fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at veita lærlinginum ein serligan yrkisførleika. Lærlingurin velur sergrein innan ta útbúgving, hann hevur gjørt lærusáttmála í.<br>*Stk. 2.* Grundlærugreinirnar fata um verkliga og ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at menna tann fakliga kunnleikan. Somuleiðis skulu grundlærugreinirnar nøkta krøvini til ungdómsútbúgvingar, herímillum styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan.<br>*Stk. 3.* Vallærugreinirnar skulu miða ímóti at nøkta áhugamál lærlingsins, at stuðla áhugan fyri framhaldandi | **§ 13, stk. 2 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Almennu lærugreinirnar fata um ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at menna tann almenna kunnleikan. Somuleiðis skulu almennu lærugreinirnar nøkta krøvini til ungdómsútbúgvingar, herímillum styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan. |

| | |
|---|---|
| útbúgving og menna yrkis- og lestrarførleikan. Vallærugreinirnar skulu eisini stimbra vanligu førleikakrøvini og arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum. | |
| **§ 14.** Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, hvørjar yrkislærugreinir og grundlærugreinir skulu verða tengdar at tí ávísu útbúgvingini.<br>*Stk. 2.* Skúlarnir gera av, hvørjar vallærugreinir skulu verða bodnar út á skúlunum. | **§ 14, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:** Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, hvørjar yrkislærugreinir skulu verða tengdar at tí ávísu útbúgvingini.<br><br>**§ 14 fær nýtt stk. 2 við hesi orðing:** Mentamálastýrið ger av, hvørjar almennar lærugreinir skulu verða tengdar at ávísari útbúgving.<br><br>**§ 14, stk. 2 verður broytt til stk. 3.** |
| **§ 15.** Undirvísingin verður løgd tilrættis við ynskjum lærlingsins í huga og lagað eftir fortreytum og áhuga hansara.<br>*Stk. 2.* Lærlingi, sum hevur tað fyri neyðini, kann verða givin serundirvísing og annar sernámsfrøðiligur stuðul.<br>*Stk. 3.* Lærlingi verður veitt ráð og vegleiðing viðvíkjandi útbúgvingini og persónligum viðurskiftum.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur fyri tey í stk. 2 og 3 nevndu viðurskifti. | |
| **§ 16.** Verkliga læran fer fram á einum ella fleiri virkjum, ið eru góðkend sum lærupláss av viðkomandi yrkisnevnd, og hon er grundað á lærusáttmála millum lærling og viðkomandi virki. Broytast fyritreytirnar fyri áður givna góðkenning, hava lærupláss skyldu til at boða viðkomandi yrkisnevnd frá hesum.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevnd, reglur um verkligu læruna í tann mun hesar reglur ikki eru ásettar í sáttmála millum viðkomandi yrkisfeløg. | |
| **§ 17.** Lærlingarnir fáa útbúgvingarskjal fyri fullførda útbúgving, heruppií váttan fyri framda skúlagongd og verkliga læru. Lærlingur, sum gevst í útbúgvingini, hevur rætt at fáa váttan fyri framd avrik.<br>*Stk. 2.* Próvtøkur verða skipaðar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur. Próvtøkur í yrkislærugreinum og serlærugreinum verða tó ásettar eftir reglum, sum yrkisútbúgvingarráðið hevur tilmælt eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevndum. | **§ 17, stk. 2 verður broytt og fær hesa orðing:** Próvtøkur verða skipaðar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur. Próvtøkur í yrkislærugreinum verða tó ásettar eftir reglum, sum yrkisútbúgvingarráðið hevur tilmælt eftir samtykt frá viðkomandi yrkisnevndum. |
| **§ 18.** Sveina- og yrkisroyndir verða hildnar í teimum einstøku útbúgvingunum, um hetta er samtykt av viðkomandi yrkisnevnd. Sveinaroyndirnar verða fyriskipaðar eftir reglum, sum eru ásettar av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum og eftir samtykt frá yrkisnevndunum.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum reglur um døming yvirhøvur og reglur um, hvussu útbúgvingarskjøl verða tilevnað og latin. | |

| | |
|---|---|
| **Kapittul 5**<br>**Ráðsskipanin**<br><br>**§ 19.** Landsstýrismaðurin setur eitt yrkisútbúgvingarráð, sum í tilmælum sínum til landsstýrismannin viðger mál sambært teimum heimildum, tí eru givnar.<br>*Stk. 2.* Yrkisútbúgvingarráðið ger viðtøkur, sum landsstýrismaðurin góðkennir. Viðtøkurnar skulu greitt lýsa mannagongdina fyri ráðsarbeiðinum, herímillum um rakstrarstuðul landsstýrisins til ráðsskrivstovuna, tilnevning og val av ráðslimum og um atkvøðugreiðslur.<br><br>**§ 20.** Yrkisútbúgvingarráðið hevur 9 limir. Ráðslimirnir verða valdir fyri fýra ár. Fyri hvønn ráðslim verður ein varalimur valdur.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin velur formannin.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin tilnevnir 4 limir, sum skulu umboða arbeiðsgevarar. Hesir limir verða valdir soleiðis:<br>1. Føroya Handverksmeistarafelag velur 1 lim<br>2. Landsstýrismaðurin velur 1 lim<br>3. Føroya Arbeiðsgevarafelag velur 2 limir<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir 4 limir, sum skulu umboða løntakarar. Hesir limir verða valdir soleiðis:<br>1. Føroya Handverkarafelag velur 1 lim<br>2. Starvsmannafelagið velur 1 lim<br>3. Felagið S&K velur 1 lim<br>4. Føroya Arbeiðarafelag velur 1 lim<br>*Stk. 5.* Eitt umboð fyri hvønn góðkendan yrkisskúla kann møta á ráðsfundum. Hesi umboð hava talurætt, men ikki atkvøðurætt.<br>*Stk. 6.* Yrkisútbúgvingarráðið kann eftir tørvi innkalla serkøna hjálp til at møta á ráðsfundum.<br>*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin veitir yrkisútbúgvingarráðnum skrivstovuhjálp og rindar útreiðslur ráðsins eftir gjøllari av landsstýrismanninum ásettum reglum, smb. § 19, stk. 2. | . |
| **§ 21.** Yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um:<br>1. reglur um útbúgvingar sum heild og hvørja útbúgving sær, smb. § 4, stk. 2.<br>2. stovnan, niðurlegging og avtøku av útbúgvingum, smb. § 5, stk. 1.<br>3. hvørjar útbúgvingar verða roknaðar sum yrkisútbúgvingar, smb. § 6, stk. 2.<br>4. verkligar partar í skúla og undirvísing á læruplássum, smb. § 7, stk. 2.<br>5. útbúgvingarreglur, smb. § 8, stk. 5.<br>6. frítøku fyri partar av útbúgvingini, smb. § 9, stk. 1.<br>7. reglur um ískoytisskeið, smb. § 9, stk. 3.<br>8. reglur um gjald fyri undirvísingartilfar, smb. § 10, stk. 2.<br>9. hvørjar yrkis- og grundlærugreinir hoyra til ávísa útbúgving, smb. § 14, stk. 1. | **§ 21, stk. 1 nr. 6 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>frítøku fyri partar av útbúgvingini, smb. § 9, stk. 2. |

| | |
|---|---|
| 10.reglur um verkligu læruna, smb. §16, stk. 2.<br>11.reglur um próvtøkur í yrkis- og serlærugreinum, smb. § 17, stk. 2.<br>12.reglur um sveina- og yrkisroyndir, smb. § 18, stk. 1.<br>13.reglur um døming o.a., smb. § 18, stk. 2.<br>14.reglur um hvussu lærlingur fær boð um at koma í skúla, smb. § 29, stk. 2.<br>15.reglur um burturvísing, smb. § 30, stk. 2.<br>16.hvussu lærusáttmálaskjal skal verða orðað, smb. § 31, stk. 2.<br>17.reglur um frávik, smb. § 44.<br>18.reglur um læraraførleika, smb. § 45.<br>19.skiftisreglur, smb. § 47, stk. 2.<br>*Stk. 2.* Yrkisútbúgvingarráðið hevur eisini til uppgávu:<br>1. at gera viðtøkur fyri ráðið, smb. § 19, stk. 2.<br>2. at tilnevna yrkisnevndir, smb. § 22, stk. 1.<br>3. at góðkenna viðtøkur fyri arbeiðið hjá yrkisnevndum, smb. § 22, stk. 2.<br>4. at seta fyribilsnevndir, smb. § 22, stk. 3.<br>5. at áseta minstuløn til lærlingar, har ið eingin sáttmáli er, smb. § 33, stk. 3.<br>6. at ráðgeva landsstýrismanninum um, hvussu útbúgvingarskipanin eigur at leggjast soleiðis til rættis, at sett mál og krøv, smb. § 2, verða nádd<br>7. at fylgja við gongdini og nýggjum vinnumøguleikum, og við støði í hesum gera landsstýrismanninum tilmæli um tørvin á nýggjum útbúgvingum og umskipan av ella avtøku av verandi útbúgvingum<br>8. at fylgja við verandi útbúgvingum og við støði í hesum gera landsstýrismanninum tilmæli um tørvin á at samskipa útbúgvingarnar betur og møguliga leggja útbúgvingar saman.<br>*Stk. 3.* Yrkisútbúgvingarráðið kann av sínum eintingum umrøða og bera fram alt, ið ráðið og yrkisnevndirnar halda hava týdning fyri yrkisútbúgvingarnar, herundir útreiðslutørvin. | **§ 21, stk. 2, nr. 3 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>at góðkenna viðtøkur fyri arbeiðið hjá yrkisnevndum, smb. § 22, stk. 6 |
| **§ 22.** Yrkisútbúgvingarráðið tilnevnir yrkisnevndir, sum skulu viðgera mál innan viðkomandi útbúgvingar við støði í teimum heimildum, sum givnar eru í hesi lóg.<br>*Stk. 2.* Limirnir í yrkisnevndunum verða valdir av viðkomandi yrkisfeløgum, sbr. § 10, stk. 4. Arbeiðsgevarar og løntakarar skulu hava javnstóra umboðan.<br>*Stk. 3.* Yrkisnevndirnar skulu tilsamans fevna um allar útbúgvingar, ið eru settar í verk eftir hesi lóg. Tá ið útbúgvingar skulu fyrireikast og setast í verk, kann yrkisútbúgvingarráðið seta fyribilsnevndir.<br>*Stk. 4.* Kunnu feløgini ikki velja yrkisnevnd, skal yrkisútbúgvingarráðið síggja til, at yrkisnevnd verður sett.<br>*Stk. 5.* Yrkisnevndirnar skulu gera viðtøkur fyri nevndararbeiðið. Viðtøkurnar skulu greitt lýsa mannagongdina fyri nevndararbeiðinum, herímillum um tilnevning og val av nevndarlimum og um atkvøðugreiðslur.<br>*Stk. 6.* Yrkisútbúgvingarráðið skal góðkenna viðtøkurnar | **§ 22, stk. 2 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Limirnir í yrkisnevndunum verða valdir av viðkomandi yrkisfeløgum, sbr. § 10, stk. 4. Í hvørjari yrkisnevnd skulu verða 2 ella 4 limir. Arbeiðsgevarar og løntakarar skulu hava javnstóra umboðan.<br><br>**§ 22, stk. 3 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Yrkisútbúgvingarnar verða bólkaðar í skyldar útbúgvingar eftir samtykt frá yrkisútbúgvingarráðnum. Ein yrkisnevnd verður sett fyri hvønn yrkisútbúgvingarbólk. Tá ið útbúgvingar skulu fyrireikast og setast í verk, kann yrkisútbúgvingarráðið seta fyribilsnevndir.<br><br>**§ 22, stk. 6 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Yrkisútbúgvingarráðið skal góðkenna viðtøkurnar fyri tær í stk. 4 og 5 nevndu yrkisnevndir. |

| | |
|---|---|
| fyri tær í stk. 4 nevndu yrkisnevndir.<br>*Stk. 7.* Partarnir á arbeiðsmarknaðinum rinda umboðum sínum í yrkisnevndum fundarpening og ferðaútreiðslur.<br>*Stk. 8.* Lærupláss rinda eitt umsitingargjald til landskassan fyri hvønn góðkendan lærusáttmála sum part av útreiðslunum til skrivstovuhjálp hjá yrkisnevndum og fyribilsnevndum. Landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum gjøllari reglur um upphæddina av umsitingargjaldinum, og hvussu gjaldið verður umsitið.<br><br>**§ 23.** Fyri tær útbúgvingar, ið eru góðkendar, ásetir landsstýrismaðurin, eftir tilmæli frá yrkisnevndunum, reglur um:<br>1. hvørja útbúgving sær, smb. § 4, stk 3.<br>2. útbúgvingartíðina, smb. § 8, stk. 4.<br>3. býtið millum verkliga læru og skúlagongd, smb. § 8, stk. 4.<br>4. stevnumiðini fyri verkligu læruna og skúlagongdina, smb. § 8, stk. 4.<br>5. valið av lærugreinum, smb. § 14, stk. 1.<br>6. góðkenning av læruplássum, smb. § 16, stk. 1.<br>7. verkligu læruna, smb. § 16, stk. 2.<br>8. próvtøkur í yrkis- og serlærugreinum, smb. § 17, stk. 2.<br>9. sveina- og yrkisroyndir, smb. § 18, stk. 1.<br>10. stytting av útbúgvingartíðini, smb. § 35, stk. 2 og § 37<br>11. leinging av útbúgvingartíðini, smb. § 36, stk. 2 og 3.<br>12. stytting ella leinging av útbúgvingartíðini, smb. § 37.<br>*Stk. 2.* Yrkisnevndirnar hava eisini til uppgávu:<br>1. at samtykkja, um ein støðisútbúgving kann góðskrivast, og lærutíðin styttast samsvarandi, smb. § 8, stk. 3.<br>2. at gera lesiætlanir fyri tær einstøku útbúgvingarnar, smb. § 24.<br>3. at virka fyri bestu viðurskiftum á læruplássum, smb. § 25, stk. 1.<br>4. at kanna lærupláss, smb. § 25, stk. 2.<br>5. at royna semju millum lærling og lærupláss, smb. § 40, stk. 1.<br>*Stk. 3.* Yrkisnevndirnar skulu eftir áheitan geva yrkisútbúgvingarráðnum ummæli í málum, ið hava týdning fyri arbeiðið hjá ráðnum.<br>*Stk. 4.* Yrkisnevndirnar kunnu av sínum eintingum umrøða og bera fram alt, ið tær halda hava týdning fyri yrkisútbúgvingarnar eftir hesi lóg.<br><br>**§ 24.** Skúli skal í samstarvi við yrkisnevndirnar gera lesiætlanir, sum neyvt lýsa innihaldið í undirvísingini við støði í teimum reglum, ið sambært § 8, stk. 4 eru ásettar fyri hvørja útbúgving sær. Skúli og yrkisnevndir eiga eisini at fylgja við, um tørvur er á at endurnýggja nevndu reglur og koma við uppskoti um hetta. | **§ 22, stk. 7 verður broytt og fær hesa orðing.**<br>Yrkisnevnd kann eftir tørvi innkalla serkøna hjálp til at møta á fundum.~~ Tá ið lesiætlanir skulu gerast, kann yrkisnevnd seta fyribilsnevnd~~.<br><br>**§ 22, stk. 8 verður broytt og fær hesa ~~til stk. 7 við hesi~~ orðing:**<br>Lærupláss rinda eitt umsitingargjald til landskassan fyri hvønn góðkendan lærusáttmála sum part av útreiðslunum til skrivstovuhjálp hjá yrkisnevndum og fyribilsnevndum.<br><br>**§ 22 fær nýtt stk. 9 við hesi orðing:**<br>Landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum gjøllari reglur um upphæddina av umsitingargjaldinum, og hvussu gjaldið verður umsitið.<br><br>**§ 23, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Fyri tær útbúgvingar, ið eru góðkendar, samtykkja yrkisnevndirnar reglur um:<br><br>**§ 23, stk. 1 verður nýtt stk. 5 sett inn við hesi orðing:**<br>stytting í lærutíðini samb. § 9, stk. 2.<br><br>**§ 23, stk. 1 nr. 5, 6, 7, 8, 9 10, 11 og 12 verða broytt til ávikavist nr. 6, 7, 8, 9, 10, 11, 12 og 13.**<br><br>**§ 23, stk. 2, nr. 1 strikast.**<br><br>**§ 23, stk. 2, nr. 2, 3, 4 og 5 verða broytt til ávikavist nr. 1, 2, 3 og 4.**<br><br>**§ 24, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Yrkisnevndirnar samtykkja í samstarvi við skúlarnar neyvari innihald í lesiætlanum við støði í teimum yvirskipaðu reglunum, ið eru ásettar fyri hvørja útbúgving sær.<br><br>§ 24 fær nýtt stk. 2 við hesi orðing:<br>Tá ið lesiætlanir skulu gerast, kann yrkisnevnd seta fyribilsnevnd við í mesta lagi 3 limum.<br><br>**§ 24 fær nýtt stk. 3~~2~~ við hesi orðing:**<br>Landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá Yrkisútbúgvingarráðnum reglur um, hvussu lesiætlanararbeiðið verður skipað.<br><br>**§ 24 fær nýtt stk. 4~~3~~ við hesi orðing:**<br>Yrkisnevndirnar og skúlarnir eiga eisini at fylgja við, um tørvur er á at endurnýggja nevndu reglur og koma við uppskoti um hetta. |

| | |
|---|---|
| **Kapittul 6**<br>**Læruplássini**<br><br>**§ 25.** Yrkisnevndirnar virka fyri, at útbúgvingar-viðurskiftini á læruplássunum eru so góð sum gjørligt.<br>*Stk. 2.* Viðkomandi yrkisnevndir kunnu, uttan dóm-úrskurð og við neyðugum løgmæti, fara inn á virki, sum hava lærling, fyri at kanna útbúgvingarviðurskiftini.<br><br>**§ 26.** Samtykt yrkisnevndarinnar um góðkenning av virki sum lærupláss verður gjørd út frá meting um virkið er ført fyri at lúka tær treytir, sum settar eru sambært reglunum um verkligu læruna, smb. § 16.<br>*Stk. 2.* Kærur um samtyktir eftir stk. 1 kunnu verða lagdar fyri eina kærunevnd eftir gjøllari av landsstýris-manninum ásettum reglum. | |
| **Kapittul 7**<br>**Sáttmálaviðurskifti**<br><br>**§ 27.** Lærusáttmáli millum lærling og eitt ella fleiri lærupláss er treyt fyri at fullføra eina yrkisútbúgving. Lærusáttmálin skal fata um alla ta verkligu læruna og skúlagongdina og um møguliga sveina- ella yrkisroynd.<br>*Stk. 2.* Um skeiðsreglurnar heimila tað, skal ískoytis-skeiðið, sambært § 9, stk. 3 verða partur av skúlagongd-ini eftir stk. 1. | **§ 27 fær nýtt stk. 2 við hesi orðing:**<br>Sveina- ella yrkisroynd skal verða hildin áðrenn sáttmálatíðin er lokin. Verður sveina- ella yrkisroynd hildin eftir at ásetta sáttmála-tíðin er lokin, skal sáttmálin leingjast til-svarandi.<br><br>**§ 27, stk. 2 verður broytt til stk. 3.** |
| **§ 28.** Er lærusáttmáli gjørdur við fleiri lærupláss, skal gjølla tilskilast, hvørjum parti av útbúgvingini tað ein-staka læruplássið hevur ábyrgdina av.<br>*Stk. 2.* Eitt lærupláss kann í lærusáttmálanum hava skyldu til at lata lærling taka ein verkligan part á øðrum læruplássi.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur um rættar-støðuna hjá lærlingi og læruplássi í sambandi við læru-sáttmálar eftir stk. 1 og 2.<br><br>**§ 29.** Fyri at útbúgvingin skal verða fullførd, skal lærlingur fylgja undirvísingini, soleiðis sum hon er fyriskipað av skúlunum sambært útbúgvingarreglunum.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum reglur um, hvussu manna-gongdin skal vera, tá ið lærlingur fær boð um at koma í skúla.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um bú-staðarhús til lærlingar í sambandi við skúlagongd.<br><br>**§ 30.** Lærlingur, sum uttan lógligt forfall heldur seg burtur frá undirvísingini, ella sum grovliga brýtur skúlans reglur, og sum ikki tekur givnar ávaringar til eftirtektar, kann verða útihýstur frá undirvísingini.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá | |

| | |
|---|---|
| yrkisútbúgvingarráðnum, gjøllari reglur um útihýsingina eftir stk. 1. | |
| **§ 31.** Lærusáttmáli skal vera undirskrivaður, áðrenn læran byrjar.<br>*Stk. 2.* Lærusáttmálin er orðaður á skjal, sum landsstýrismaðurin góðkennir eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um góðkenning, skráseting og avgreiðslu av lærusáttmálum. | **§ 31, stk. 1** **strikast.** ~~**broytt og fær hesa orðing:** Lærusáttmáli skal vera undirskrivaður, áðrenn læran byrjar, smb. § 8, stk. 1.~~<br><br>§ 31, stk. 2 og 3 verða broytt til ávikavist stk. 1 og 2. |
| **§ 32.** Tá ið lærlingur, sum er undir foreldramyndugleika, ger lærusáttmála, ella um sáttmálabroyting fer fram, krevur hetta játtan frá verjanum. | |
| **§ 33.** Lønin, sum eitt lærupláss skal rinda lærlingi, skal verða ásett í lærusáttmálanum.<br>*Stk. 2.* Lønin skal í minsta lagi verða tann, ið ásett er í sáttmála millum viðkomandi yrkisfeløg.<br>Stk. 3. Í yrkisgreinum, har eingin sáttmáli er galdandi, verður minstalønin ásett av yrkisútbúgvingarráðnum.<br>*Stk. 4.* Landskassin endurrindar læruplássunum lærlingalønina, sum tó ikki kann verða hægri enn ásetta minstalønin fyri handverkslærlingar sambært sáttmála millum Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag, meðan lærlingurin fær ta til læruna hoyrandi skúlagongd.<br>*Stk. 5.*Landskassin veitir læruplássum eitt fast gjald til ferðaútreiðslur, sum standast av, at lærlingur er noyddur at fara til Danmarkar fyri at fáa ta til læruna hoyrandi skúlagongd, av tí at henda skúlaundirvísing ikki fæst í Føroyum.<br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur viðvíkjandi ásetingunum í stk. 4 og 5. | **§ 33, stk. 4 verður broytt og fær hesa orðing:** Landskassin endurrindar læruplássunum lærlingalønina, sum tó ikki kann verða hægri enn ásetta minstalønin fyri handverkslærlingar sambært sáttmála millum Føroya Handverkarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag, meðan lærlingurin fær ta til læruna hoyrandi skúlagongd. Uppgerð skal verða Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi 8 vikur eftir hvørt skúlaskeið.<br><br>**§ 33, stk. 5 verður broytt og fær hesa orðing:** Landskassin veitir læruplássum eitt fast gjald til ferðaútreiðslur og vistarhald, sum standast av, at lærlingur er noyddur at fara til Danmarkar fyri at fáa ta til læruna hoyrandi skúlagongd, tá ið henda skúlaundirvísing ikki fæst í Føroyum. Uppgerð skal verða Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi 8 vikur eftir hvørt skúlaskeið. |
| **§ 34.** Í útbúgvingartíðini galda avtalur í arbeiðsmarknaðarsáttmála ella ásetingar í lóggávu.<br>*Stk. 2.* Eitt lærupláss kann bert sum undantak áleggja lærlingi arbeiði, sum ikki hevur samband við útbúgvingina, og tá bert treytað av, at málið við útbúgvingini kann verða rokkið. | |
| **§ 35.** Hevur lærlingur frammanundan lokið ein part av tí útbúgving, sum nevnd er í lærusáttmálanum, kann sáttmálin vanliga bert fata um vantandi partarnar av verkligu læruna og skúlagongdini, smb. § 8, stk. 2 og § 9, stk. 1.<br>*Stk. 2.* Fyri lærling, sum av aðrari útbúgving ella viðkomandi arbeiðsroyndum hevur serligar fortreytir at fara undir ta útbúgving, sáttmálin fatar um, kann viðkomandi yrkisnevnd samtykkja, at útbúgvingin kann verða stytt eftir teimum í § 8 ásettu reglum um útbúgvingartíð. | **§ 35, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:** Hevur lærlingur frammanundan lokið ein part av tí útbúgving, sum nevnd er í lærusáttmálanum, kann sáttmálin vanliga bert fata um vantandi partarnar av verkligu læruni og skúlagongdini, smb. § 9, stk. 2.<br><br>**§ 35, stk. 2 verður broytt og fær hesa orðing:** Fyri lærling, sum av aðrari útbúgving ella viðkomandi arbeiðsroyndum hevur serligar fortreytir at fara undir ta útbúgving, sáttmálin fatar um, kann viðkomandi yrkisnevnd samtykkja, at útbúgvingin kann verða stytt eftir teimum í § 9, stk. 1 og 2 ásettu reglum um útbúgvingartíð. |
| **§ 36.** Lærlingur og lærupláss kunnu gera avtalu um at | |

| | |
|---|---|
| leingja útbúgvingartíðina, um lærlingurin,<br>1. vegna sjúku hevur verið burtur frá virkinum meir enn 10% av ásettu lærutíðini<br>2. er burtur frá virkinum vegna eykaundirvísing í skúla, smb. § 9, stk. 4.<br>3. hevur farloyvi í sambandi við barnsburð ella ættleiðing<br>4. hevur niðursetta arbeiðstíð ella farlovvi orsakað av serligum viðurskiftum<br>*Stk. 2.* Um avleiðingarnar av eini avtalu eftir stk. 1 verða tær, at útbúgvingartíðin verður longd meira enn ta tíð, sum lærlingurin hevur verið burtur, so er avtalan bert galdandi, um viðkomandi yrkisnevnd góðkennir avtaluna.<br>*Stk. 3.* Eru lærlingur og læripláss ikki samd um longda útbúgvingartíð vegna fráveru sum nevnt í stk. 1, kann viðkomandi yrkisnevnd, eftir áheitan frá pørtunum, áseta longda tíðarskeiðið.<br><br>**§ 37.** Í øðrum førum enn teimum, ið nevnd eru í §§ 35 og 36, kann viðkomandi yrkisnevnd, tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí, samtykkja at stytta ella leingja útbúgvingartíðina.<br><br>**§ 38.** Partarnir kunnu ikki siga upp lærusáttmálan.<br>*Stk. 2.* Teir fyrstu 3 mánaðirnir í sáttmálatíðini verða tó roknaðir sum royndartíð, har annar parturin kann siga sáttmálan upp uttan grundgeving og uttan freist. Skúlagongd verður ikki roknað upp í royndartíðina.<br>*Stk. 3.* Um lærlingur av orsøk, sum nevnt í § 36, stk. 1, er burtur frá virkinum í meira enn 1 mánaða í royndartíðini, verður hon longd samsvarandi.<br><br>**§ 39.** Um annar parturin ikki heldur skyldur sínar, kann hin parturin siga lærusáttmálan upp.<br>*Stk. 2.* Um onkur týdningarmikil treyt fyri at gera lærusáttmálan er skeiv ella seinni dettur burtur, kann hin parturin siga sáttmálan upp.<br>*Stk. 3.* Uppsøgn eftir stk. 1 ella 2 skal fara fram innan ein mánaði eftir, at uppsigandi parturin hevur fingið kunnleika um viðurskiftini ella eftir vanligum sketni skuldi havt fingið kunnleika til viðurskiftini, sum uppsøgnin er grundað á.<br>*Stk. 4.* Eykaundirvísingin sbr. § 9, stk. 4 kann ikki leggjast til grund fyri uppsøgn av lærusáttmálanum.<br>*Stk. 5.* Verður lærlingur útihýstur frá skúlagongdini sambært § 30, fellur lærusáttmálin burtur.<br><br>**§ 40.** Ósemja millum lærling og læripláss kann einans verða løgd fyri viðkomandi yrkisnevnd, sum skal royna semju.<br>*Stk. 2.* Um so er, at semja ikki fæst í lag eftir 1. stk., kann málið verða lagt fyri eina sáttmálanevnd, smb. § 41. | **§ 38, stk. 1 verður broytt og fær hesa orðing:**<br>Partarnir kunnu ikki einsíðis siga upp lærusáttmálan. Tó kann lærusáttmáli sigast upp, um báðir partar skrivliga vátta hetta. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 3.* Ósemja kann ikki leggjast fyri dómstól ella aðrar myndugleikar enn teir, sum nevndir eru í stk. 1 og 2, samanber tó § 42, stk. 4.<br><br>**§ 41.** Trætur kunnu leggjast fyri eina sáttmálanevnd við 3 limum. Landsstýrismaðurin setur sáttmálanevndina. Yrkisfeløgini fyri avvarðandi yrkisgrein velja hvønn sín lim. Landsstýrismaðurin velur triðja limin, ið er formaður og skal verða løgfrøðingur.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur fyri virkisøki sáttmálanevndarinnar.<br><br>**§ 42.** Sáttmálanevndin kann seta lærusáttmála úr gildi og taka støðu til spurningin um endurgjald.<br>*Stk. 2.* Sáttmálanevndin kann bert taka støðu til spurningar um tulking av arbeiðsmarknaðarsáttmálum, tá ið sáttmálanevndarlimirnir eru samdir.<br>*Stk. 3.* Úrskurðirnir hjá sáttmálanevndini kunnu fullgerast eftir reglunum í rættargangslógini um tvingsilsfullgerð av dómum.<br>*Stk. 4.* Í seinasta lagi 8 vikur eftir úrskurð sáttmálanevndarinnar kunnu partarnir leggja málið fyri Føroya Rætt.<br><br>**§ 43.** Skúlin hevur skyldu at skaðatryggja teir lærlingar, sum eru í skúla samsvarandi hesi lóg, um lærlingarnir ikki á annan hátt eru skaðatryggjaðir undir skúlagongdini.<br><br>**Kapittul 8**<br>**Aðrar ásetanir**<br><br>**§ 44.** Landsstýrismaðurin kann í serligum føri, tá ið tað ræður um at fremja útbúgvingarroyndir, víkja frá reglunum í 3. og 4. kapitli í hesi lóg. Yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli um hetta.<br><br>**§ 45** Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum, gjøllari reglur um undirvísingarførleika.<br><br>**§ 46.** Kærur um avgerðir skúlanna, kunnu, eftir gjøllari av landsstýrismanninum ásettum reglum, leggjast fyri landsstýrismannin.<br><br>**Kapittul 9**<br>**Gildiskoma og skiftisreglur**<br><br>**§ 47.** Henda lóg kemur í gildi 1. august 1999, tó soleiðis, at 5. kapittul kemur í gildi 1. januar 1999.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur, eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum reglur um, hvussu lógin verður nýtt | **Mælt verður til, at omanfyri nevndu broytingar koma í gildi tá lógin er lýst. ~~1. august 2002.~~** |

| | |
|---|---|
| fyri yrkisútbúgvingar, ið eru byrjaðar, men ikki endaðar, áðrenn henda lóg kemur í gildi. Skulu higartil galdandi reglur nýtast, ásetur landsstýrismaðurin eisini reglur um at flyta virksemið, ið liggur hjá ráðum o.ø. eftir higartil galdandi reglum, til teir myndugleikar, sum skulu umsita skipanina eftir hesi lóg.<br>*Stk. 3.* Samstundis sum henda lóg kemur í gildi, fer løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 um lærlinga-viðurskifti, við seinri broytingum, og løgtingslóg nr. 128 frá 21. mai 1993 við seinni broytingum um tøkniligar yrkisútbúgvingar, úr gildi. | |

## Almennar viðmerkingar:

Uppskotið um løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum broytt við løgtingslóg nr. 65 frá 10. mai 2000, varð tilevnað av nevnd, sett av landsskúlastjóranum í 1995. Lógaruppskotið hevði tágaldandi donsku yrkisútbúgvingarlógina sum leist.

Yrkisútbúgvingarráðið samtykti á vári 2001 at seta eina nevnd at endurskoða lógina. Niðurstøðan hjá hesi nevnd er, at royndirnar av skipanini hava sum heild verið góðar, men tó mælir nevndin til, at ávísar broytingar og tillagingar verða framdar í lógini, í flestu førum av fyrisitingarligum og praktiskum slagi.

## Viðmerkingar til tey einstøku broytingaruppskotini:

***Til § 4:***
Við orðingini í stk. 1 ger landsstýrismaðurin ger tær yvirskipaðu reglurnar fyri hvørja útbúgving sær, soleiðis at skilja, at tær neyvaru reglurnar verða gjørdar eftir samtykt av teimum ávísu yrkis-nevndunum. Tær reglurnar verða gjørdar við heimild í § 24 í einstøku lesiætlanunum – sí uppskotið um broytingar til ta lógargreinina.

Upplýsast kann, at ráðið áður hevur viðgjørt spurningin um útbúgvingarkunngerðir. Samtykt varð tá at taka undir við áheitanini frá yrkisnevndafyrsitingini, um at útbúgvingarkunngerðirnar verða skipaðar sum sonevndar *rammukunngerðir*, t.v.s., at tann einstaka kunngerðin um ta ávísu útbúgvingina inniheldur tær yvirskipaðu reglurnar um útbúgvingina, og at tær neyvaru reglurnar, herundir um smálutirnar í fakligum høpi, verða samtyktar á nevndarfundum við avvarðandi yrkisnevnd.

Ein av grundunum – vist nokk høvuðsgrundin – til at skipa kunngerðirnar sum rammukunngerðir er, at orka ikki er til at gera og at viðlíkahalda kunngerðir, har allir staklutir verða umrøddir. Talan er tá um kunngerðir, sum ofta eru tíggjutals blaðsíður, og sum møguliga skulu broytast við ávísum millumbili. Ein rammukunngerð væntast at verða uml. 3-4 bls.

***Til § 8, stk. 1:***
Nær lærusáttmáli skal hava gildi, er eitt av teimum málum, sum hevur givið nógv óneyðugt stríð. Onkur lærupláss dagfesta sáttmálan langa tíð frammanundan, at hann verður sendur til Yrkisdepilin.

Roynt hevur verið at fáa meira skil á hesum viðurskiftum og varð tí mælt til, at tað í galdandi kunngerð, kunngerð nr. 101 frá 18. juni 2001 um lærusáttmálar o.a., varð ásett, at *"Læruplássið skal senda undirskrivaða sáttmálan til skrivstovuna hjá avvarðandi yrkisnevnd í seinasta lagi 4 vikur eftir, at sáttmálin er undirskrivaður." (§2).* Hetta var ein roynd at fáa rættlag í hesi viðurskift, sum hevur hjálpt nakað. Men vit hava framvegis trupulleikar av hesi rættuliga viðkomandi ásetingini – bæði fyri góðkenningarmyndugleikunum, men ikki minst fyri partarnar í einum lærusáttmála.
Við hesi lógarbroyting, vil hesin spurningur verða heilt greiður. Hetta merkir, at lærupláss fyrst undirskrivar lærusáttmálan og sendir hann síðani til Yrkisdepilin.

***Til § 8, stk. 2 og 3:***
Reglurnar í § 8, stk. 1 og 2 vóru innsettar í lógina við serligum atliti at SIT-útbúgvingini. I praksis verða reglurnar als ikki nýttar í sambandi við t.d. FHS.
Mælt verður til at skilja millum avriksflutning vegna áður lokna skúlagongd og avriksflutning, sum stavar frá arbeiðsroyndum.
Reglurnar um avriksflutning vegna skúlagongd eiga at verða ein yvirskipað regla og ikki tengdar at einum ella fleiri yrkjum, meðan avriksflutningur vegna arbeiðsroyndir, av tí at talan kann verða um so ymiskar arbeiðsroyndir, at felags reglur ikki kunnu gerast hesum viðvíkjandi, eiga at verða samtyktar av yrkinum.

***Til § 9:***
Mælt verður til at býta § 9, stk. 1 í tvey (stk. 1 og stk. 2), har stk. 1 ásetur stytting vegna útbúgving. Yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli hesum viðvíkjandi, meðan yrkisnevndirnar smb. stk. 2 samtykkja, um arbeiðsroyndir kunnu veita stytting í parti av verkligu læruni ella skúlagongdini.
Yrkisnevnd kann vanliga ikki veita stytting fyri arbeiðsroyndir, ið stava frá, at lærlingur, áðrenn lærusáttmálin er góðkendur av góðkenningarmyndugleikanum, er byrjaður "at læra". Meginreglan er, at lærupláss skal hava læruplássgóðkenning áðrenn lærusáttmáli verður stovnaður, og at lærutíðin í fyrsta lagi kann byrja, tá ið lærusáttmálin er dagfestur og undirskrivaður av góðkenningarmyndugleikanum, smb. § 8.

***Til § 10:***
Við støði í galdandi áseting, varð eitt uppskot samtykt í ráðnum um gjald av undirvísingartilfari hjá lærlingunum. Løgfrøðiliga varð mett í MMS, at reglur um gjald einans kundu ásetast, um tað greitt sást í lógartekstinum, hvør skuldi gjalda. Í uppskotinum varð ásett, at læruplássini skuldu endurrinda lærlingunum útreiðslurnar til undirvísingartilfar, og at læruplássini skuldu eiga tilfarið. Mælt verður nú til, at hetta verður beinleiðis ásett í lógini.

***Til §§ 11, 12, 13 og 14:***
Við broyttu ásetingini verða reglurnar greiðari, soleiðis at skilja, at yrkislærugreinir er eitt eintáttað heiti fyri samlaða fakliga innihaldið í teimum einstøku útbúgvingunum. Tær almennu lærugreinirnar, sum í høvuðsheitum eru tengdar at øllum útbúgvingum á miðnámsstigi, eru lærugreinir, sum t..d. støddfrøði, alis- og evnafrøði, lívfrøði, føroyskt og enskt á C- ella øðrum stigi. Samanumtikið kann sigast, at broytingaruppskotið ber við sær, at tað fakliga innihaldið í yrkisútbúgvingunum verður samtykt av yrkisnevndunum, meðan tær almennu lærugreinarnar verða valdar av Mentamálastýrinum og vallærugreinarnar av skúlunum. Broytingin í § 17 er ein avleiðing av hesum.

***Til § 17:***
Broytingin er ein avleiðing av broytingunum í §§11-14

Formateret

***Til § 21, stk. 1, nr. 6:***
Broytingin er ein avleiðing av broytingunum í § 9.

Formateret

***Til § 21, stk. 2, nr. 3:***
Broytingin er ein avleiðing av broytingini í § 22, stk. 6

Formateret

***Til § 22§§ 19 0g 20:***
Fyri at fáa greiðari reglur, verður mælt til, at lógin ásetir talið av limum í hvørjari yrkisnevnd.

***Til § 22, stk. 3***
Uppskotið um broyting hevur við sær, at betri samsvar er millum lógaráseting og praksis.

***Til § 22, stk. 6:***
Mælt verður til, at ráðið eisini góðkennir viðtøkurnar hjá øllum yrkisnevndunum og ikki einans tær í stk. 4. Orsøkin til hetta er, at ráðið fram til nú hevur gjørt leist til viðtøkur hjá yrkisnevndunum. Hesin leistur hevur eisini verið roknaðar at galda fyri allar yrkisnevndirnar.

***Til § 22, stk. 7 og 8:***
Ávísir trupulleikar hava áður tikið seg upp um fundarpening og ferðasamsýning til yrkisnevndarlimir. Hesin trupulleiki er møguliga ikki so sjónskur í dag, men verður tó hildið, at tað hevði verið til fyrimunar fyri allar partar, um allar útreiðslurnar av yrkisnevndararbeiðnum, herundir løn til skriv-stovuhjálp og til fundar- og ferðaútreiðslur hjá yrkisnevndunum og fyribilsnevndunum, vóru partur av umsitingargjaldinum. Hetta hevur við sær, at tað verður lættari at umsita hendan partin. M.a. kundi yrkisnevndafyrisitingin í størri mun lagt arbeiðið hjá yrkisnevndunum til rættis.

Mælt verður eisini til, at yrkisnevnd kann seta fyribilsnevnd, tá ið um t.d. lesiætlan skal gerast. Limirnir í fyribilsnevndum fáa samsýning á sama hátt sum yrkisnevndalimir, t.v.s., at samsýningin verður fíggjað av umsitingargjaldinum.

Upphæddin fyri umsitingargjaldið eigur – um so er, at hesar broytingar verða framdar - at verða ásett samsvarandi.

***Til § 23:***
Tá ið lógin varð viðgjørd á Føroya Løgtingi í 1998, varð broyting gjørd í lógartekstinum í §§ 22 og av onkrari orsøk eisini í § 23, stk. 1. Nevndin, sum hevði tilevnað uppskotið, mælti til hesa orðing í § 23, stk. 1: *"Fyri tær útbúgvingar, ið eru góðkendar, samtykkja yrkisnevndirnar reglur um: ....".* Hendan orðing gjørdist, sum nevnt omanfyri: *" Fyri tær útbúgvingar, ið eru góðkendar, ásetir lands-stýrismaðurin, eftir tilmæli frá yrkisnevndunum, reglur um."*

Við verandi orðing er ávísur skeivleiki íkomin, við tað at landsstýrismaðurin ikki skal áseta reglur um alt tað, sum nevnt er í § 23, stk. 1. Í øðrum lagi sáar orðingin iva um aðalreglurnar, sum annars eru galdandi í allari lógini, um at *Yrkisútbúgvingarráðið* ger tilmæli til landsstýrismannin, tá ið tað snýr seg um ásetingar landsstýrismansins.

Mælt verður tí til at broyta § 23, stk. 1 til upprunaligu orðingina, nevnliga: *"Fyri tær útbúgvingar, ið eru góðkendar, samtykkja yrkisnevndirnar reglur um: …."..*

***Til § 24:***
Broytta ásetingin skilur millum yvirskipaðar reglur fyri hvørja útbúgving sær. Hesar reglur verða ásettar við heimild í § 4, stk. 1, meðan tær neyvaru reglurnar (lesiætlanirnar) verða ásettar við heimild í § 24. Av tí at tær neyvaru reglurnar ikki eru partur av sjálvari útbúgvingarkunngerðini, verður hildið rættast, at reglur verða ásettar, hvussu lesiætlanararbeiðið skal skipast, m.a. at tryggja, at brúkararnir (t.e. skúlar o.o.) fáa neyðugu kunningina um lesiætlanirnar.
Grundin til at avmarka talið av limum í fyribilsnevndini er av praktiskum og fíggjarjáttanarligum orsøkum.

***Til § 27:***
Í flestu førum verður sveina- ella yrkisroynd hildin í ásettu sáttmálatíðini. Tó kemur fyri, at sveina- ella yrkisroynd ikki verður hildin, fyrr enn eftir at sáttmálatíðin er úti.

Hetta hevur viðført spurningin, hvat t.d. lønin skal vera, frá tí at ásetta sáttmálatíðin er lokin til sveina- ella yrkisroyndin er staðin og eisini hvør hevur ábyrgdina av læruni, um sáttmálatíðin er úti osfr.

***Til § 31, stk. 1:***
Henda áseting er fyri tað fyrsta óneyðug. Í øðrum lagi er óheppi, at ein áseting kemur aftrat tí, sum frammanundan er ásett í § 8, og sum harumframt skapar eina torskilta fatan av, hvussu ásetingin skal skiljast í mun til § 8.

Formateret

Formateret

***Til § 33:***
Tað er sera trupult at stýra fíggjarætlanina fyri nevndu útreiðslur, av tí at læruplássini ofta ikki lata uppgerð yvir skúlagongdina til Mentamálastýrið (Yrkisdepilin) ofta fyrr enn langt aftaná, ja upp til 1 ár (áður upp til fleiri ár) eftir at lærlingurin hevur tikið skúlagongdina.
Upplýsast skal, at Yrkisdepilin hevur fingið ruddað nakað upp í hesum, soleiðis at tað ikki longur koma inn uppgerðir, sum eru so gamlar. Men hetta hevur í ár havt við sær, at tað varð neyðugt at biðja um eykajáttan heilar tvær ferðir til hesar lógarbundnu útreiðslurnar.

Mælt verður tí til, at ein tíðarfreist fyri innlating av uppgerðum fyri lokin skúlaskeið verður ásett í sjálvari lógini. Hetta er hóast alt nógv betri og ruddiligari – bæði fyri læruplássini og Yrkisdepilin.

Í uppskotinum verður mælt til, at endurgjaldið eisini fevnir um vistarhaldsútreiðslur, meðan lærlingur tekur skúlagongdina í Danmark. Viðmerkjast skal, at hetta krevur eina størri játtan á fíggjarlógini, og verður leysliga mett, at tørvurin verður uml. 750.000 kr.

***Til § 35, stk. 2:***
Broytingin er í høvuðsheitum avleiðing av broytingunum í § 9. Yrkisnevnd kann vanliga ikki veita stytting fyri arbeiðsroyndir, ið stava frá, at lærlingur, áðrenn lærusáttmálin er góðkendur av góðkenningarmyndugleikanum, er byrjaður "at læra". Meginreglan er, at lærupláss skal hava læruplássgóðkenning áðrenn lærusáttmáli verður stovnaður, og at lærutíðin byrjar, tá ið lærusáttmálin er dagfestur og undirskrivaður av góðkenningarmyndugleikanum, smb. § 8

Formateret

***Til § 38:***
Hóast lógin greitt tilskilar í § 38, stk. 1, at *"Partarnir kunnu ikki siga upp lærusáttmálan"*, kemur ofta fyri, at lærlingar ella læripláss av ymiskum orsøkum ynskja at uppsiga lærusáttmálan. Í roynd og veru verður hetta gjørt við teimum treytum, at báðir partar vátta hetta skrivliga. Tað verður gjørt á oyðublaðnum "Umsókn um broyting í lærusáttmála".

Við hesi lógarbroyting fæst ein greið heimild í lógini hesum viðvíkjandi.

———